# Vinna »skeivu« dystirnar

Tað var kanska ikki á útivølli móti liðnum, sum nú er á øðrum plássi, at KÍ skuldi bjarga sær. Men tað kundi verið líkt til, at skal KÍ hava neyðugu stigini, so skulu hesi fáast til høldar í júst slíkum dystum. Í øllum førum hevur KÍ staðið seg serstakliga illa móti kappingarneytunum í botninum, har alt ov fá stig eru fingin til høldar. Á stigatalvuni hevur KÍ bara fimm sigrar at vísa á, og av hesum er bert tann eini komin móti liði úr niðaru hálvu. Hetta var á heimavølli móti B71. Hinir fýra sigrarnir, sum KÍ hevur vunnið í ár, eru komnir í báðum heimadystunum móti B36 og á útvivølli móti ávikavist HB og NSÍ.



# Heðin var skaddur í eyganum

Tað kom illa við hjá KÍ, at Heðin á Lakjuni ikki kundi spæla sunnudagin. Orsøkin til hetta var, at hann týsdagin fekk ein bólt beint í andlitið. Og onkursvegna hevur hesin rakt somikið meint, at sjónin er órógvað. Tí var ikki ráðiligt hjá honum at spæla sunnudagin, men sum skilst er hann tøkur aftur sunnudagin.

B36-KÍ 1-0 (0-0):

# KÍ er í botni

*B36*

*KÍ*

**B36 spældi seg sjáldan heilt upp, men avrikið var meira enn ríkiligt til at senda eitt serstakliga tannleyst KÍ-lið heim við ongum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað var ikki so ofta, at B36 noyddist at geara so øgiligt upp sunnudagin. Her er Klæmint Matras í hørðum nærdysti við Steffan Kalsø*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hvørki Rógvi Jacobsen ella Heðin á Lakjuni vóru til reiðar at tørna út fyri KÍ sunnudagin. Tað í sjálvum sær er stórur missur, og tað vildi tað eisini verið hjá einum og hvørjum øðrum liði.

Men hetta eigur tó ikki at verða nýtt sum umbering hjá klaksvíkingum, sum formáddu sær onkra staðni millum lítið og einki í Havn sunnudagin.

**Deydligur hálvleikur**

Fyrri hálvleikur var ein hampuliga stór oyðimarkargonga. KÍ tóktist vilja halda fast um stigið, sum teir høvdu á kontini, tá dysturin byrjaði, og tí hugsaðu teir meira um at standa rætt í verjuni, heldur enn at satsa nakað serligt frameftir.

Hjá B36 var viljin kanska til staðar, men tað var tó sjáldan, at teir veruliga fingu spælt tunt. Alt ov ofta gjørdist talan um tølandi bóltflytarí í verjuni og á miðvøllinum, og tí varð verjan hjá KÍ sjáldan fangað á skeiva beininum. Undantakið var, tá press frá Sam Malson og Jákupi á Borg endaði við stórum møguleika til Jákup, men navnin og landsliðsfelagin í málinum bjargaði framúr væl.

**Orkaðu ikki**

Tað var eingin ivi um, at tað var B36, sum skuldi skapa dystin, og eftir steðgin átóku teir sær í nógv størri mun tann leiklutin. Fyrst og fremst takkað verið einum stórspælandi Santos á bakkinum og einum nærum eins stórspælandi Róaldi Jacobsen á sentrala miðvøllinum.

Mál fingu teir eisini rættiliga skjótt, tá Sam Malson dró mitt fyri, áðrenn hann úr 18 metrum smekkaði til. Jákup Mikkelsen hevði vána útsýni, tá skotið varð sent avstað, og so stóð hann púrasta negldur á strikuni.

Og so varð av álvara lagt upp til einvegis ferðslu. Klaksvíkingar vóru illa sperdir, og helst skuldu teir royna at flyta spælið fram, men hetta bara at kalla als ikki til. Og fremsta orsøkin tóktist ver,a at menn als ikki orkaðu at spæla Formula-bólt í 90 minuttir. Neyvleikin fall, so hvørt sum pulsurin á sperdu monnunum hækkaði, og tí sóust sjáldan fleiri enn tvær-tríggjar samanhangandi sendingar í spælinum fram eftir vøllinum.

Mest merkisvert var í so máta, at B36 ikki megnaði at økja um leiðsluna og harvið punktera dystin. Í vinstru komu Santos, Magnus Olsen og Jákup á Borg óteljandi ferðir aftur um illa sperda Harley Bertholdsen, men neyvleikin var akkurát ov lítil, tá seinasta sendingin skuldi leggjast. Í so máta var tað kanska eisini symptomatiskt, at størsti vandin var á ferð, tá Johan Ellingsgaard ta einu ferðina hálvkiksaði eitt innlegg, sum brast í handara stólpa.

**Spældu sum botnlið**

Men trupulleikar fekk B36 tó ongantíð. Nakrar deyðbóltsstøður hevði KÍ, men nærri enn hesum komu teir ongantíð. Í so máta var merkisvert, at KÍ ikki satsaði meira í hesum standardstøðunum, men tað var kanska eyðkent fyri hugburðin hjá liðnum hesaferð, at teir ikki vildu stórt meira enn tað sama.

Í sjálvum sær er tapið nú heldur ikki nøkur vanlukka. Tað er ikki í Gundadali móti B36, at KÍ skal bjarga sær árinum. Til hetta verða komandi tríggir dystirnir – B71, B68, ÍF – munandi meira avgerandi. Men tað er samstundis greitt, at skulu hesir dystir geva ynsktu úrtøkuna, so skulu heilt aðrir bollar í suppuna. Sunnudagin spældi KÍ sum ein niðurflytari, og tað er ráðini ikki til longur.

# Smálutir at justera



Hjá Peturi Mohr var talan um fyrsta dystin, síðani hann fyri viku síðani tók við sum KÍ-venjari.

Heldur hásur á málinum tók hann til eftir dystin, at avrikið sum so ikki var nóg gott.

- Vit høvdu nakað av trupulleikum við skaðum, men tú hevur rætt í, at avrikið ikki var serliga sannførandi.

*Hvørjum lutum ætlar tú serliga at arbeiða við undan næsta dystinum?*

- Har eru nøkur ting. Tað nýtist ikki at verða so øgiliga nógv, sum skal til, fyri at avrikið skal betrast, só eg eri bjartskygdur. Sera bjartskygdur.

*Í Klaksvík ilskast fólk um vána gongdina hjá KÍ ár. Hevur eitt felag sum KÍ ikki fólk, sum átti at borga fyri eini betri støðu?*

- Støðan í dag er tann, at vit mugu vera Heðin á Lakjuni og Rógva Jacobsen fyriuttan, eins og Rodrigo er hálvskaddur. Og tað merkist, tá slíkir spælarar ikki eru við.

*Men eru teir við um eina viku?*

- Tað fer tíðin at vísa. Heðin rokni eg heilt víst við verður tøkur, og so mugu vit síggja, hvussu verður við hinum báðum. Hjá okkum ræður so um at arbeiða miðvíst og at taka ein dyst í senn, sigur Petur Mohr.

# Høvdu tamarhald á



Odmar Færø, sum spældi í miðverjuni hjá B36 sunnudagin, helt eftir dystin, at teir fyri tað nógva høvdu tamarhald á tí, sum fyrifórst á vøllinum.

- Fyrra hálvleik hava vit bóltin nógv, men vit skapa ikki tað heilt stóra, tá vit hava hann. Tíbetur skora vit so beint eftir steðgin, og eftir tað haldi eg ikki, at sigurin veruliga er í vanda.

*Men tit megna ikki at skora seinna málið, sum veruliga kann punktera dystin?*

- Nei. Vit royna, men tað málið kemur so ikki. Tað gjørdi so eisini, at vit ongan tíð kundu kenna okkum heilt tryggar, men vit fingu trý stig í dag, og tað er fínasta slag, segði Odmar Færø.